# So hilla vit og skreiða…



Løgmaður við fullari ferð á sletu uppi á Lambafelli í gjár



KAVI

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er so sjáldan, at vit verða vælsignað við hvítum jólum, men soleiðis var hesaferð. Í góðveðrinum um jólini hava nógv havnarfólk leitað sær niðan á Lambafelli við gamla enda á Oyggjarvegnum. Hetta er gamal siður hjá havnarfólki – og tað er næstan altíð gott at skreiða har.

Millum teirra, sum stuttleikaðu sær á Lambafelli í gjár var eisini Kaj Leo Johannesen, sum var har saman við børnunum.

Hóast tað hevur verið lýggjari, so sigur hann framvegis frá kulda, so vit kunnu roknað við kava restina av árinum – í øllum førum uppi á Lambafelli, har temperaturin lættliga er tvey stig lægri enn niðri í Havn.

# Vinnan og Varðin broyta navn

**P/F Vinnan broytir navn til P/F Varðin og P/F Varðin broytir navn til P/F Hvamm.**

FISKIVINNA

*Tíðindaskriv*
*P/F Varðin*

P/F Varðin varð stovnað í 1986, tá felagið fór í gongd við at byggja Trónd í Gøtu, sum kom í januar 1987. Síðani eru trý skip komin afturat í reiðaríið.

Við støddini hevur eisini verið neyðugt at broyta bygnaðin í felagnum. Móðurfelagið, P/F Vinnan, varð stovnað í 2002. Dótturfeløgini, sum hoyra til móðurfelagið í dag, eru: P/F Varðin, sum eigur Trónd í Gøtu, P/F Krossbrekka, sum eigur Finn Fríða, S/Pf Gulenni, sum eigur Saksaberg og P/F Driftin, sum eigur Jupiter.

Men síðani 2002 er navnið 'vinna' vorðið alt meira nýtt í fjøllmiðlunum og tosað verður um vinnuna, vinnulív, byggivinnu, svartkjaftavinnu, alivinnu og Vinnuna í Gøtu alt í einum.

Tí fær P/F Vinnan nú navnið P/F Varðin, sum er upprunanavnið í felagnum. Hetta er eitt navn, sum vit frammanundan eru von við, og sum er eitt vakurt navn við dámligum týdningi. Búmerki verður tað sama.

P/F Varðin broytir navnið til P/F Hvamm. Hvamm er eitt staðarnavn í Gøtu. Hvamm er beint sunnanfyri Tyril.

Navnið Hvamm hevur áður verið nýtt sum reiðarínavn í Gøtu. Tað var Eivind Hansen sáli, saman við øðrum, sum átti Báruna. Báran royndi eftir sild við gørnum.

# Fáa sær prát við politiið

**Jóladagarnar ringja ofta fleiri fólk til politiið bara fyri at hava onkran at práta við**

JÓL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Um jóltíðir kimar telefonin stútt hjá politinum.

Tað er ikki bara um hálkuóhapp, húsaófrið og annað.

- Summi ringja bara fyri at práta. Tey hava kanska ongan annan at tosa við, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Tey, sum hava vakt hjá politinum á jólum, eru ofta noydd til at kvetta hesi telefonprát av, tí boð eru eftir teimum til aðrar uppgávur.

- Men vit royna eftir førimuni at práta við tey. Jólini eru so kensluborin tíð, og nógvir tankar mala í høvdunum hjá fólki, sigur vakthavandi.

# Tvørkirkjuligt tiltak í Havn nýggjársnátt

TÍÐINDASKRIV

1. januar verður eitt spennandi nýtt nýggjarstiltak í Badmintonhøllini í Havn. Tiltakið kallast »Nýtt 2010« og verður skotið í gongd klokkan 01 beint aftan á, at síðsta rakettin er farin í luftina.

Fyriskiparinir fyri hesum tiltakið eru Ebenezer, Evangeliuhúsið, Frelsunarherurin, Filadelfia, Hebron, Lívdin, Meinigheitshúsið í havn, Kirkju og missiónshúsið á Argjum og Oasan.

Tiltakið var fyrstu fer síðsta ár og tað eydnaðist sera væl og tey ungu vóru ótrúliga væl nøgd við og ynsktu, at hetta skuldi vera eitt afturvendandi tiltak og tí hava vit avgjørt, at hava tað aftur í ár.

Har verður nógv á skránni, m.a. café alla náttina, lovsangsløta, undirhald við og sangframførðslir. Café'in borðreiðir við feskari súpan, kaffi og køkum - alt ókeypis.

- Har verður eisini eitt bønarrúm, har man kann fáa forbøn ella eitt prát ella bara vera einsamallur í frið eina løtu. Alt í alt verður tað eitt sera spennandi tiltak har nógv er á skránni, siga fyrireikararnir.